# Eysturoyggin ein ella tvær kommunur!

EMIL S. JACOBSEN

Havi roynt at fylgt við kjakinum um at fáa kommunurnar í størri eindir, helst soleiðis, at Eysturoyggin gerst ein ella tvær eindir.

Á hesum øki hevur borgarstjórin í Fuglafirði, Sigurð Simonsen, verið tann stóri "taktikkarin."

Hann veit, at Fuglafjørður er ov lítil til at vera einsamøll, og at kasta seg í føvningin hjá Gøtu og Leirvík er ikki skilagott; men hann verður noyddur at velja síðu.

Hann hevur í løtuni tveir møguleikar: Annar er at fara saman við Klaksvík, og hin er saman við Runavík, ella allari Eysturoy.

Uppskotið, hann kemur við, um ein privatfíggjaðan tunnil millum Kambsdal og Skálabotn, er eitt tað mest skilagóða uppskot, sum nakar kommunalpolitikari er komin við, um undirsjóvartunnilin millum Eysturoynna og Havnina gerst veruleiki.

Í løtuni tykist Fuglafjørður at liggja sum ein "blindtarmur" í meginøkinum, sjálvt við einum fjølbroyttum og vaksandi vinnulívi og øllum framhaldsskúlunum í oynni.

Kemur tunnilin, gerst støðan ein heilt onnur.

Eg skilji heldur ikki, at landsstýrimaðurin, sum umsitur landsvegirnar, ger sær dælt av hesum av hesum frálíka uppskoti.

Tunnilin hjá Sigurð kemur at kosta uml. 60 – 70 mill. kr., meðan tunnilin hjá Landsverki millum Gøtudal og Skálabotn kostar leystliga mett 250 mill. kr.

Tunnilin kemur eisini at hava nógv størri nyttu fyri norðara part av Streymoy og Eysturoy, og vestara arm á Skálafjørðinum, um hann verður har, ið Sigurð ynskir hann at verða; fyri eystara arm er tað líkamikið.

Tað verður eisini lættari fyri fuglfirðingar at velja síðu í eini møguligari kommunusamanlegging.

# Skal ein løgmaður siga satt?

HØGNI HOYDAL



**Heldur enn at viðgera politiskar spurningar sakliga og taka atfinningar til sín, verður farið lætt um sannleikan. Seinast í málinum um føroyska sendistovu í Íslandi. Tað er eitt álvarsmál fyri fólkaræðið**

Vit síggja tað allastaðni í heiminum. Í tí fjølmiðlaborna fólkaræðinum, er vorðið meira týdningarmikið hjá politikarum, hvussu tú kann fáa mál at *tykjast* vera, heldur enn tað, tey eru í veruleikanum. Tí verða spunasmiðir settir og mótálop fyrireikað, tá okkurt keðiligt mál kemur upp fyri ráðharrar og flokkar. Hvat er satt ella skeivt, tykist hava lítlan týdning. Og serliga er tað sitandi valdið, ið nýtir størstu orkuna at forða atfinningum og "ringum málum", ið andstøða ella fjølmiðlar reisa.

Seinasta dømið er spurningurin um at hava føroyska sendistovu í Íslandi. Eitt mál sum Poul Michelsen og síðani undirritaði hava sagt okkara hugsan um. Orsøkin er sjálvsagt, at hetta týðir nógv fyri okkum. Báðir eru javnan í sambandi við íslendskar politikarar, og hava í summar eisini samstarvað um ítøkilig uppskot í Útnorðurráðnum, ið skulu fremja hetta mál og ynski um sensistovur í okkara grannalondum. (Fyri rættleikans skyld, skal eg eisini gera vart við, at Poul Michelsen atkvøddi ímóti uttanríkispolitisku heimildarlógini, um nakar hevur skilt tað ørðvísi).

**Marknaðarføring og "branding" undir øðrum flaggi?**

Tí er sjálvsagt rætt og neyðugt, at vit gera vart við okkara ónøgd, tá løgmaður vil seta sendifólk á donsku sendistovuna, og at vit gera vart við, at uttanríkispolitiska lógin og Fámjinsskjal v.m. ganga ímóti okkara ynskjum. Fyri samleika, marknaðarføring og "branding" hjá Føroyum í altjóða samskifti, halda vit tað vera serstakliga umráðandi, at vit byggja upp egna umboðan og samleikamerkir uttanlands. Ikki minst í Íslandi, har serligar mentanarligar og søguligar orsøkir eru til, at føroyingar undir donskum flaggi. Tað ber so til at viðgera politisku ósemjurnar og ymiski málini - og so kanska finna eina betri loysn. Hetta er jú eitt mál, ið eitt samt ting kundi staðið saman um.

Hvat velur løgmaður so at gera? Ja, hann viðger ikki okkara atfinningar ella teir møguleikar, ið eru at lurta eftir ráðum og ynskjum. Ístaðin velur løgmaður - við sínum "løgmansstatusi" á baki - alment at sáa iva um trúvirði hjá Pouli og undirritaða. Hann skrivar - og verður endurgivin í fjølmiðlunum fyri at siga: at tað er "íspunnið" og "als ikki rætt", ið vit hava ført fram um føroysk sendiumboð, sum skulu húsast í donskum hølum í Reykjavík.

Altso: Vit hava íspunnið málið og givið rangar upplýsingar. Eitt klassiskt mótálop sambært gruggingarnar ABC.

**Skjalprógv um ósannindi**

Hvat er so satt í hesum máli? Hetta er orðarætt endurgeving úr tí skjali, ið løgmaður sendi fíggjarnevndini í des 2006, og sum løgtingið játtaði honum pengar til við 2. viðgerð av fíggjarlógini (orðarætt endurgivið úr áliti frá fíggjarnevndini, men mín undirstriking):

*"Landsstýrið hevur heitt á fíggjarnevndina um at seta pening av til eina sendistovu í Reykjavík við fylgjandi viðmerkingum:*

*Í sambandi við, at Hoyvíkssáttmálin er komin í gildi, eru vit nú komin til, at tað er av stórum týdningi, at føroysk sendistova verður sett á stovn í Íslandi, sum kann hjálpa føroyska vinnulívinum og føroysku almennu skipanini á staðnum. Tískil hevur Landsstýrið avgjørt at seta eitt sendiumboð við somu tign, sum okkara sendimenn í Brússel og London, í Íslandi. <u>Sendiumboðið verður partur av donsku attachéskipanini og fær innivist á donsku sendistovuni í Reykjavík.</u> Mett verður, at kostnaðurin av at reka føroysku sendistovuna í Íslandi er 2,5 mió. kr. árliga. Byrjað verður nakað inn í árið, og verður tískil roknað við kostnaði í 2007 á 2 mió. kr."*

Hetta er altso tað einasta ítøkiliga í málinum. Tí dugi eg als ikki at skilja, at løgmaður kann sleppa avstað við at siga, at okkara atfinningar eru "íspunnar". Og um løgmaður - sum hann vil vera við - nú hevur tikið avgerð um at leiga hølir í Reykjavík - so átti hann at komið aftur í tingið at fingið nýggja heimild.

**Undirskrivtin bindur**

Løgmaður sigur eisini í sínum innleggi í bløðunum, at tað verður Merkið og føroyski veðrurin, ið kemur at prýða eini føroysk høli. Nú hevur ongin hildið uppá, at Merkið og veðrurin ikki fara at síggjast, men eg havi víst á, at sambært undirskjalinum til sonevnda "Fámjinsskjalið", so verður tað í hvussu er saman við Dannebrog og donskum skeltum.

Hetta byggi eg á hesa orðarættu endurgeving úr nevnda skjali:

"***De udstationerede medarbejdere har som udgangspunkt kontor på den pågældende repræsentation. På anmodning fra Lagmandens Kontor og med værtslandets og Udenrigsministeriets accept kan medarbejdere dog placeres på en anden adresse.***" (Undirskjal til Fámjinsskalið, s.2).

"***Det forudsættes at lokalerne i enhver henseende fremtræder som en del af Kongeriget Danmarks repræsentation, også med hensyn til skiltning, flagning m.m.***" (Fótnota í undirskjali til Fámjinsskjalið, s.2).

Vónandi fara hesar atfinningar at fáa ta avleiðing í minsta lagi, at ein munandi betri loysn verður funnin enn hon, ið lá í kortunum. Eftir stendur, at í øðrum londum hevði tað verið ein gøla, ið fekk avleiðingar beinanvegin, um stjórnarleiðarin alment og á tingi, gevur rangar upplýsingar til tess at seta politiskar atfinnarar í ringt ljós.

# Trupulleikar við harðskapi

EYÐSTEIN BORGARDAL

"Føroyar, er eitt stað, ið er tað nærmasta Paradísi, sum vit koma á jørð." segði Jenis av Rana. Óivað fekk hetta bæði kenslur og tankar í gongd hjá mongum av okkum. Óansæð hvat ein helt/heldur um hatta, so tykist tað, at Føroyar, vit, ið kallast kristin í mun til tjóðirnar rundan um okkum, eru í holt við at gerast meira lík teimum á summum økjum, har ímillum harðskapi. Tann spurningurin, ið eg meti verða sera umráðandi, er: Hvussu basa vit harðskapinum? Eitt uppskot frá løgregluni er, at tað skal gerast ólógligt at ganga við knívi uppi á sær. Tað merkir, at um tað ikki er góð nokk grundgeving fyri at ganga við knívi, so kann løgrelan "grípa inn" og taka knívin frá viðkomandi. Nevnt var í greinini í Dimmu, at tað var broyting komin í vápnalógina í Danmark, men tíverri saknaðist hagtølini, so tað var ikki týðiligt um tað hevði gjørt nakran mun. Tí, man má spyrja, um tað fer at gera nakran mun at bannlýsa knív í býnum og almennum høpi. Men hvat fær okkum at halda, at tað fer at gera so nógvan mun, hví metir man, at tað er knívurin, ið er trupulleikin? Tað verður kanska ikki sagt í orðum, men tá okkara loysn upp á harðskapin verður at banna tað vápnið, ið verður nýtt, so gevur tað eina ábending um okkara hugsunarhátt. Tí, tað er ikki knívurin, ið er trupulleikin.

Sum nevnt var í oddagreinini í Dimmu, so hava føroyingar altíð gingið við knívi, tað er einki óvanligt her. Kann tað vera eitt sindur naivt at hugsa, at tað fer at hjálpa at bannlýsa? Tað er mangt annað, ið eisini er ólógligt, men sumt av tí veksur alsamt t. d. nýtslan av rúsevnum. Um hetta uppskot gjørdist veruleiki, hvussu skal politiið so gera í náttarlívinum, skulu teir ganga til hvønn einstakling og spyrja um viðkomandi hevur knív við sær? Men hvat, hesin ungi kann sjálvandi lúgva beint inn í andlitið á politistinum. Skal politiið kannað øll tey ungu likamliga eftir, fyri at vita um tey bera knív? Ella skal man bert fara eftir teimum, ið síggja mistonksom út? Halló! Hetta haldi eg ikki verða tann besta loysnin. Eg vildi mett, at ein annar spurningar tørvar at svarast: hvussu fáa vit tey ungu (um tað bert eru tey ungu, ið nýta harðskap...) at gevast við harðskapinum? Tað, ið eg haldi vera sera skelkandi, er at hesir 15 og 17 ára gomlu vóru vinir. Hvat fær ein, til at stinga sín egna vinmann niður? Hví er tað so nógvur harðskapur, hvaðani kemur hann?

Tað, ið eg vildi mett eina góða loysn, er, um tey, ið útinna harðskapin, sjálvu avgjørdu at ikki bera seg soleiðis at. Men, um tað ber til, dugi eg ikki at siga og hvussu hetta skal gerast, veit eg í skrivandi løtu ikki, tíverri. Vónandi kunnu vit, føroyingar, einast um hetta mál og finna eina haldgóða loysn. Líkamikið hvat man heldur um visjón 2015, sjálvt um tað gongur framá fíggjarliga, so fer Føroyar ikki at vera eitt tað besta landið at liva í, so leingi hesin harðskapur vinnur framá. Hóast alt, vilja vit liva rík og ótrygg?

Við ynski um tryggari viðurskiftir




**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.